gult18 cyan18 magenta18 svart18

Svimja í Danmark

30 ungfólk úr Havn fara um vikuskiftið at kappast í stórari danskari svimjikapping

SVIMJING
Jákup Mørk

Í morgin, hósdagin, fara 30 svimjarar frá Havnar Svimjifelag til Danmarkar at luttaka í opnari svimjikapping. Hetta er ein kapping hjá felagnum, Swim-West í Esbjerg, og verður kappast í aldursbólkunum 11 til 15 ár. Talan er um eina av heilt stóru kappingunum í Europa, og fara í alt einir 1.900 svimjarar at luttaka. Kappast verður í døgunum, 25. – 27 mei.

Í tíðindaskrivi sigur svimjisambandið, at endamálið við ferðini er at geva ungu svimjarunum møguleika at royna seg í stórum kappingum. Nakað sum felagið sigur vera sera týdningarmikið til tess at menna ungu talentini, sum eru í felagnum.

Todi verður tøkur

Talan er allar helst ikki um nakran álvarsligan vøddaskaða hjá føroyska álopsessinum

DANMARK
Jákup Mørk

Alt bendir á, at Todi Jónsson verður klárur at spæla, tá FCK um knappar tvær vikur skal spæla týdningarmesta dystin á árinum.

Mánadagin varð Todi kannaður av læknanum hjá FCK, Frank Odgaard, og boðini tykjast ikki at vera so ræðandi, sum tað av fyrstan tíð var líkt til. Frank Odgaard sigur, at í løtuni fær hann ikki staðfest við vissu, hvat slag av skaða, talan er um, men at tað eftir øllum at døma er ein sokallað forstrekking. Talan verður tí væntandi um ein steðg upp á einar 10 dagar, og skuldi Todi sostatt verið 100% til reiðar at spæla hin 10. juni.

Kappróðurin í Klaksvík er komin afturíaftur

KAPPRÓÐUR

Tríggjar manningar úr Klaksvík vunnu á bygdarstevnuni á Strondum, og tað birtir vónir fyri góðum úrslitum hjá vertunum fyri norðoyarstevnuni

At Vestmenningar vann 10-mannafarsróðurin kemur neyvan óvart á, men annars gjørdu fleiri nýggir bátar um seg

Ársins fyrsti kappróður var sunnudagin. Talan var ikki um FM kappróður, men um bygdarstevnuróður á Strondum. Tað vil siga, at tað skal ikki leggjast meiri í úrslitini av hesum róðrinum, enn at talan var um vinardyst ella venjingarróður, áðrenn tað á norðoyarstevnu í Klaksvík annan leygardag verður álvari.

Men undanfarin ár hevur tað víst seg, at róðurin uttarlaga á vestursíðuni á Skálafjørðinum plagar at vera góð ábending um, hvussu væl manningarnar eru fyri, áðrenn tað verður álvari.

Og skulu vit nýta róðurin í góðum líkindum á Skálafjørðinum sum grundarlag, so kann ikki annað sigast, enn at tað tykist vera álvari í hjá klaksvíkingum. Síðani síðsta róðrarár hevur róðrarfelagið har norðuri fingið tríggjar nýggjar bátar. Manningarnar hava lagt nógv fyri í venjingini, og tað tykist vera grundarlag fyri, at klaksvíkingar hava orsøkir til meiri enn at vóna, at tað fer at hilnast væl í heimasjógvi á norðoyarstevnu.

Nú eru fleiri ár síðani, at nakar bátur úr Klaksvík vann ein kappróður, og tað er sjálvandi væl longri síðani, at tríggjar manningar úr Klaksvík vunnu sama róðrardag. Men soleiðis var tað sunnudagin.

Kvinnurnar umborð á nýggja Páll Fanga, og genturnar umborð á nýggju Fípuni Føgru vóru sannførandi. Í Klaksvík hava tey sett stórt álit á, at áttamannafarið Nevið Reyða skal lyfta mannfólkakappróðurin fram hagar, sum klaksvíkingar ikki hava verið í eini tredivu ár. Og tað hilnaðist óvanliga væl hjá Nevinum Reyða, sum so at siga vant burturúr kappingarneytunum. Argjabáturin var næstfremstur, og Kvívíkingur endaði á triðja plássinum.

At Tjaldrið vann í kappingini ímillum fimmmannaførini við dreingjum, er einki nýtt. Strálan vann kappingina ímillum seksmannafør mannað við monnum. Tað hava teir fleiri ferðir gjørt tey seinastu árini.

Uppaftur minni nýtt er í tí, at Vestmenningur vinnur í kappingini ímillum tríggjumannaførini. Í hesi síðstu kappingini vóru bara tríggir bátar við. Eysturoyingur var klárt nummar tvey, og Skálabáturin, sum als ikki tók lut í kappingini í fjør, var aftastur.

Tað eru tvær vikur til norðoyarstevnuna, og tað kann nógv broytast til ta tíð. Tað skal eisini takast við, at fleiri av bátunum, sum ofta plaga at vera frammarlaga, ikki vóru við á Strondum.

Úrslitini av Strondum

5-mannafør gentur

1	Fípan Fagra	5.09,3
2	Tjaldrið	5.12,05
3	Ørnin	5.22,12
4	Hvassi	5.28,11
5	Havfrúgvin	5.24,11
6	Drekin	5.28,11
7	Blikur	5.30,10
8	Báran	5.46,04
9	Spógvin	5.46,07

6-mannafør kvinnur

1	Páll Fangi	5.03,17
2	Sølmundur	5.07,19
3	Hvessingur	5.16,12

5-mannafør dreingir

1	Tjaldrið	4.50,18
2	Frúgvin	4.56,16
3	Blikur	5.00,01
4	Sílið	5.00,04
5	Fípan Fagra	5.02,11
6	HJavfrúgvin	5.07,13
7	Drekin	5.10,04
8	Báran	5.14,22
9	Erla Kongsdóttir	5.19,05

6-mannafør menn

1	Strálan	7.14,08
2	Hvessingur	7.18,15
3	Sølmundur	7.20,04
4	Lómur	7.25,00
5	Riddarin	7.26,13
6	Snopprikkur	7.29,22
7	Gongurólvur	7.32,22
8	Fortúnan	7.41,10

8-mannafør

1	Nevið Reyða	6.38,20
2	Argjabáturin	6.44,01
3	Kvívíkingur	6.48,13
4	Knørrur	6.51,18
5	Ormurin Langi	6.55,09
6	ØRvur	7.01,11

10-mannafør

1	Vestmenningur	6.47,24
2	Eysturoyingur	6.52,24
3	Skálabáturin	6.54,12

Barnasúkkling

Aftur í ár fer Tórshavnar Súkklufelag at skipa fyri barnasúkkling

SÚKKLING
tíðindaskriv

Tórshavnar Súkklufelag fer aftur í ár at venja børn at súkkla, hetta eru børn og ung frá 3. flokki og til 14 ára aldur . Í ár venjur hesin bólkur tvær ferðir, ímóti einari í fjørð, hetta fyri at íðkararnir skulu fáa sum mest burturúr. Sum í fjørð, verður byrjað uttanfyri bygningin hjá Føroya Tele uppi á Hálsi.

Venjingartíðirnar eru mánadag og mikudag kl 18.00- 19.00 , tó í dag kl 16.00.

Ætlanin er, at skipa fyri barna og ungdómssúkkling á øllum FM-róðrarstevnunum í summar, so ungu súkklararnir sleppa at royna tað teir venja í kapping. Hetta eru Grand Prix kappingar, og verða børnini bólkað soleiðis:

Bólkur 1 : 6,7 og 8 ár.
Bólkur 2 : 9,10 og 11 ár.
Bólkur 3 : 12,13 og 14 ár.

Hesir bólkar verða so aftur býttur sundur í gentur og dreingir. og fáa íðkararnir stig eftir hvussu gingist hevur. Vinnararnir verða kosnir á Ólavsøku, og fáa heiðurstekin tá, meðan teir á hinum stevnunum fáa skreytbløð.

Sum í fjørð, skulu allir súkklarar vera í hjálmi, bæði tá teir venja og tá teir kappsúkkla.

Fyrsta kappingin børn og ung kunnu bjóða seg fram til, verður Balslev Runt. Henda kapping skuldi verið síðsta heyst, men bleiv útsett, tí Balslev´s Timiburhandil bygdi uppí. Nú er so liðugt, og verður kappingin tá verkfallið er av. Lýst verður í bløðunum.Øll børn í aldrinum 7-14 ár kunnu vera við, og súkkla tey í aldursbýttum riðlum.

1/8 triathlon

Sum ein liður í venjingini til Oyggjaleikirnar skipaði Føroya Triathlon Felag í vikuskiftinum fyri tveimum kappingum. Einara 1/8 triathlon kapping leygardagin, og einari tíðarsúkkling sunnudagin.

Í triathlon svumu, súkklaðu og runnu íðkararnir ávíkavist 750 metrar, 20 kilometrar og 5 kilometrar. Svomið var í Svimjihøllini, súkklað var út Havnini, inn í Kaldbaksbotn og aftur til Skógrøkt Landsins, higani runnið var fram við strond, til Sparikassan og aftur til Skógrøkt Landsins.

Tíðirnar vóru hesar:
1. Gunnar Dahl Olsen. 1.14.51.
2. Beinir Rasmussen. 1.16.05.
3. Evald Rasmussen. 1.21.59.
4. Hallur Stakssund. 1.24.24.
5. Kári Simonsen. 1.24.45.

Tíðarsúkklingin sunnudagin var úr Kaldbak til Havnar, og síðani niðan á Kleynisvarða.

Tíðirnar vóru hesar:
1. Gunnar Dahl Olsen. 36.09
2. Sverri Mohr Edvinson. 38.21
3. Kári Brattaberg. 40.02
4. Beinir Rasmussen. 42.14
5. Christian Guttesen 42.53
6. Eli Christiansen. 44.00
7. Kári Simonsen. 44.55
8. Evald Rasmussen Givin)

Báðar dagarnar var vindur og regn, so tíðirnar kunnu ikki sammetast við tíðir aðrir tri-íðkarar hava, so FTF bíðar nú eftir góðveðri, tá skipað verður fyri einum _ triathlon venjingarkapping. Til hesa, sum til allar aðrar kappingar felagið skipar fyri, eru øll ið hava hug at royna hvør dugur er í teimum vælkomin.

gult19 cyan19 magenta19 svart19

Lakjumenn lyftu okið burturav fuglfirðingum

Svarti Per varð sunnudagin fluttur úr Fuglafirði og vestur í Vágar. Men tað eru ikki bara ÍF og FS Vágar, sum hava tapt stórt. Eftir 10–0 tap ímóti B36 tók HB, sum í 1971 og 1972 bukaði ÍF av, besta liðið úr landskappingini í 1945

FÓTBÓLTSMET
Jóannes Hansen

ÍF liðið, sum síðani 1971 hevur havt ivasama metið at hava lagt rygg til størsta tapið nakrantíð. Nú er okið tikið av teimum og flutt vestur í Vágar. Samstndis er heiðurin at hava vunnið størsta sigurin nakrantíð fluttur úr HB og til B36

B36 setti met sunnudagin. Teir vunnu 15–0 á FS Vágar, og harvið lyftu teir seg enn eina ferð í hesum kappingarárinum upp um grannarnar í HB. Hesar seinastu vikurnar hava verið góðar hjá B36, meðan tað hevur skorist heilt illa hjá HB. B36 skal spæla finalu á Tórsvølli á ólavsøku, meðan HB fall í hálvfinaluni. Sunnudagin lyfti B36 seg upp um HB á støðutalvuni, og sunnudagin tók B36 metið frá HB, sum frammanundan hevði vunnið størsta sigurin nakrantíð í landskappingini.

Stórsigrarnir í nýggjari tíð

15–0 sigurin hjá B36 er tann størsti nakrantíð í landskappingini. Í steypakappingini er tað onkuntíð komið fyri, at sigrarnir hava verið størri, men tað telur ikki við í hesum førinum, tí tá hevur talan verið um uppgerðir ímillum lið, sum ikki hava verið í somu deild í landskappingini.

Tað er komið fyri fleiri ferðir tey seinastu árini, at talan hevur verið um sigrar við tíggju málum, og hvørja ferð hava sumbingar lagt rygg til. Tvær ferðir ímóti B36 og eina ferð ímóti GÍ.

Í fjør vann B36 í 4. umfarinum 11–1 á Sumba í Gundadali, og í 1998 var munurin tann sami. Ta ferðina vann B36 í 12. umfarinum 10–0 á Krossinum.

GÍ eigur eisini ein tíggju mála sigur at vísa á. Tað var í 1998, tá sumbingar í Sarpigerði løgdu rygg til 10–0 tap.

Frá 1976 og fram til 1987 vóru átta lið í bestu deildini. Hesi árini var eingin sigur so stórur, sum teir, ið eru nevndir omanfyri.

HB hevði takið á ÍF

Inntil síðsta sunnudag var størsti sigurin nakrantíð í landskappingardysti vunnin 1. august í 1971. Hetta árið høvdu fuglfirðingar dittað sær at bjóða hinum liðunum í 1. deild av.

HB var sera væl fyri. Teir høvdu vant nógv í summarsteðginum, meðan fuglfirðingar als ikki vóru í venjing, tá teir tríggjar dagar eftir ólavsøku komu á eyrvøllin í Gundadali, sum nógva regnið hevði broytt til hyljar og runudýki.

Úrslitið var 14–2. ÍF kom á odda, og Sam Jacobsen skoraði bæði málini hjá ÍF.

HB hevði gott tak á fuglfirðingum um hetta mundið. Ikki minst á vøllinum í Fuglafirði, sum tá var nógv minni, enn hann er nú. Tá HB fyrireikaði seg til dystin í Fuglafirði í 1972, merktu teir vøllin í Gundadali, soleiðis at merkta økið hevði somu stødd sum vøllurin í Fuglafirði. Teir spentu tvein fyri at fáa røttu vallarbreiddina, og tað loysti seg. HB vann 13–1, og Jákup Frants Larsen, sum nú er kommunuskrivari í Fuglafirði, skoraði einasta málið hjá heimaliðnum.

Stórsigrarnir í gamlari tíð

Tað kann væl vera, at okkurt er farið burtur ímillum hjá okkum, tá vit hava leitað uppaftur longri aftur í tíðina. Men vit hava funnið tveir dystir, har FM vinnararnir frá í fjør, VB, hava lagt rygg til rættulig stórtap. 9. juli í 1950 var tað einki stuttligt at vera vágbingur á Tvøroyri. Henda dagin vann TB á Sevmýri 13–1 ímóti VB.

Og 23. mai í 1953 var aftur heilt galið hjá VB. Tá taptu teir 13–0 í landskappingardysti í Klaksvík. John Reid Bjartalíð roynir í 50 ára minningarritinum hjá KÍ at bera í bøtuflaka fyri vágbingar. Um orsøkina til stórsta sigurin nakrantíð hjá KÍ í einum landskappingardysti sigur hann, at VBarnir vóru illa fyri henda dagin. Teir høvdu havt sera langa tíð um norðurferðina, og harafturat var liðið veikt mannað.

Fyrstu árini eftir at tað í 1942 var varið undir landskappingina í fótbólti, var kappingin skipað í bólkum. Í 50 ára minningarritinum hjá HB verður nevnt, at TB í 1942 vann 14–0 á Sevmýri ímóti HB. Hetta var ikki í landskappingini, men HB legði tíðliga í tíðini rygg til stórtap. Jógvan Arge sigur í 50 ára minningarritinum at fyrsta lið kollapsaði í 1945. Tað árið taptu teir 10–0 ímóti B36 og Herluf Mikkelsen, sm var kvikur og hevði sjáldsama góðan teknikk, skoraði átta mál. Aftaná tapti HB 8–0 í Klaksvík og 9–0 í Gundadali ímóti KÍ, og so var einki annað at gera, enn at taka fyrsta lið úr landskappingini, hevur Jógvan Arge lisið í gerðabókini.

Lakjumeninir og Fuglafjørður

Nú mugu vit koma aftur til yvirskriftina til hesa greinina. Vit skulu ikki lata salt í sárið hjá vágamonnum, men eftir 15–0 ósigurin sunnudagin, er tað ein veruleiki, at teir hava ivasama metið í varðveitslu.

Fuglfirðingar hava havt størsta tapið hangandi á sær síðani 1971. Tað gongst einki hjá ÍF í næstbestu deildini, men í Fuglafirði kunnu tey senda avkominum hjá góðum fuglfirðingum eina vinarliga heilsan.

Magni á Lakjuni skoraði sunnudagin fýra mál ímóti FS Vágar, og Heðin á Lakjuni var toppskjútti við fimm málum. Magni er sonur Harry á Lakjuni, og Heðin er sonur Victor á Lakjuni. Teir eru fuglfirðingar, synir hjá Jákupi Oluf á Lakjuni, sála. Lakjumenninir hava altíð verið óførir í fótbólti, og nú vóru tveir av teimum við til at lyfta okið, sum hevur hingið á ÍF í 30 ár, burtur av felagnum, sum flestu Lakjumenninir hava lært at spælt fótbólt í.

Heðin á Lakjuni er uppvaksin í Klaksvík og hevur spælt við KÍ, men pápi hansara, Victor á Lakjuni, spældi eitt sindur við ÍF fyri meiri enn tredivu árum síðani.

Pápi Magna á Lakjuni hevur ikki spælt nakað serligt, tí Harry hevur altíð verið skipsmaður. Men tað er ikki undarligt, at Magni er ein góður fótbóltsspælari. Umframt genini á Lakju síðuni, so skal tað ikki gloymast, at Meinhardt Dalbúð er mammubeiggi hansara. Meinhardt var toppskjútti, tá ÍF í 1979 vann FM, og síðst í áttati árunum spældi hann við B36, sum sunnudagin – m. a. við góðum stuðli frá fuglfirðingum – syrgdi fyri, at Svarti Per varð fluttur úr Fuglafirði og vestur í Vágar.

Heðin á Lakjuni, sum er sonur fuglfirðingin Victor á Lakjuni, skoraði sunnudagin fimm mál fyri B36 og hjálpti harvið væl til at taka keðiliga metið frá ÍF

Magni á Lakjuni, sum er sonur fuglfirðingin Harry á Lakjuni, skoraði sunnudagin fýra mál fyri B36 og hjálpti harvið væl til at taka keðiliga metið frá ÍF